

## SAMTAK limirnir fáa ókeypis løgfrøðiliga ráðgeving

Frá mikudegnum 17. juni kunnu limir í feløgunum í SAMTAK – tað er Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag og Føroya Fiskimannafelag - fáa ókeypis løgfrøðiliga ráðgeving. - Her bróta vit upp úr nýggjum, tí í mun til aðrar skipanir, fevnir hendan ráðgevingin ikki bert um spurningar, sum hava við arbeiðsviðurskifti at gera, men limirnir kunnu eisini leita sær ráðgeving um onnur løgfrøðilig mál, eitt nú um arvaspurningar, húsakeyp, bilkeyp og persónlig viðurskifti, sigur SAMTAK. Talan er um telefonráðgeving, har advokaturin hjá SAMTAK hvønn mikudag frá klokkan 18 til klokkan 19 er til reiðar at svara spurningum frá limunum.

## Lágargarður savnar pening til útferðir

Starvsfólk á Lágargarði royna at útvega pening at nýta til útferðir hjá búfólkunum. Leygardagin 13. juni skipa starvsfólk á Røktar- og umlættingarheiminum Lágargarður í Tórshavn fyri loppumarknaði. Marknaðurin verður frá klokkan 14 til 17 í matarhøllini á heiminum, ið liggur í Stoffalág 84. Á marknaðinum ber til at ognað sær bæði klæði, postalín, brúkslist, prýðislutir, brúkslutir av ymsum slag umframt annað. Onkur kann óivað gera kvettið. Til ber eisini at keypa sær ein kaffimunn við onkrum afturvið. Peningurin, ið kemur inn, verður allur nýttur til at skipa fyri ymsum útferðum hjá búðfólkunum á heiminum.

# Stuttleikir á Tórsbreyt

**Sunnudagin verður aftur møguleiki hjá teimum yngstu børnunum at uppliva frælsa ítrótt á Tórsbreyt. Hetta verður á Stuttleikum, sum Hvirlan skipar fyri**

FRÆLS ÍTRÓTT
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Stuttleikir verða aftur í ár á Tórsbreyt. Tiltakið verður nú sunnudagin*

Aftur í ár verða Stuttleikir á Tórsbreyt. Stuttleikir er eitt tiltak, har børn fødd í 1999 ella seinni sleppa at royna seg í trimum ymiskum greinum innan frælsu ítróttina. Hesar greinar eru 60 metra renning, longdarlop og bóltkast. Greinarnar umboða høvuðsbólkarnar innan frælsu ítróttina, tað vil siga kast, lop og renning.

Tiltakið byrjar klokkan 14 og heldur áfram til klokkan 16. Hetta er eitt tiltak har børnini eru í fokus og tí er tiltakið skipa soleiðis, at barni fær eitt skreytblað við egnum navnið á, tá tað meldar til, og hevur so hetta við sær til ymsu greinarnar. Síðan kann barnið sjálvt velja, hvørt tað vil kasta, leypa ella renna fyrst. Eftir hvørja roynd skrivar høvuðsdómarin úrsliti hjá barninum á skreytblaðið. Fyrstu trý úrslitini í hvørjari grein verða skriva á skreytblaðið.

Øll børn, sum hava fingið minst eitt úrslit í hvørji grein á sítt skreytblað, fær heiðursmerkið fyri avrikið. Øll børnini eru tó vælkomin at royna hvørja grein so ofta, tey hava hug, inntil tiltakið endar.

Tilmelding er á staðnum og byrjar klokkan 13.30 og heldur áfram til klokkan 15.30.

# Frítt at útflyta fiskafóður til Noregs

**Tað stendur nú føroyskum útflytarum frítt at útflyta medisineraða fóður til Noregs. Tað er greitt eftir, at norskir myndugleikar hava boðað Uttanríkisráðnum frá, at heilsufrøðiligu forðingarnar í sambandi við føroyskan útflutning av medisineraðum fiskafóðri eru beindar burtur**

ÚTFLUTNINGUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Allar handilsforðingar eru avtiknar og tí kunnu føroyingar frítt útflyta medisineraða fiskafóður til Noregs*

Føroyska apoteksverkið er ein av útflytarunum, sum kann fáa gagn av føroyska útflutninginum av medisineraðum fiskafóðri. Heri Mørkøre, landsapotekari, fegnast um at forðingarnar loksins eru burtur.

- Norskir alarar hava í fleiri umførum sett seg í samband við okkum fyri at fáa føroyskt fiskafóður til teirra framleiðslu. Vit hava frá byrjan vitað, at vit hava havt neyðugu góðkenningarnar til at flyta út, men norskir myndugleikar hava forðað fyri tí í fleiri ár. At forðingarnar eru beindar burtur, kann fáa stóran týdning fyri framtíðarvirksemið hjá føroyska apoteksverkinum. Ein av fyrimununum er, at nú kunnu brúkarar í Noregi, sum nýta fóður frá Havsbrún, fáa heilivág í tí fóðrinum, teir dagliga nýta, sigur Heri Mørkøre, landsapotekari.

Ferð kom á málið um fiskafóðri eftir fund millum Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharra, og Jonas Gahr Støre, norskan uttanríkisráðharran, í desember mánaði 2008.

-Vit hava í fleiri umførum víst á, at norsku heilsufrøðiligu forðingarnar hava verið bygdar á skeivar fortreytir. At norskir myndugleikar nú broyta støðu, er prógv um, at okkara støða hevur verið røtt frá byrjan. Okkara áhaldni í uttanríkispolitikki gevur úrsliti, sigur Jørgen Niclasen.

## Influensa A er nú heimsfarsótt

Heimsheilsustovnurin, WHO, metir nú H1N1-influensuna, eisini kallað svínakrím sum eina pandemi. Hetta skrivar heimasíðan hjá DR. Tað merkir, at influensan nú er ein heimsfarsótt.

- Heimsheilsustovnurin hjá ST hevur í einum brævi til øll limalondini hækkað hóttanarstigið til 6, sum er tað hægsta á pandemistiganum, sigur Anders Tegnell frá svenska pandemibólkinum.

*- Er hetta nú ein epidemi?*

- Ja, vit kunnu ikki tulka tað upp á nakran annan máta, sigur Tegnell. Boðini eru greið, sigur hann.

WHO kallaði inn til tíðindafund í gjár í Geneve klokkan 17.

Heitið pandemi sigur einki um, hvussu vandamikil eina sjúka er, men hvussu útbreidd hon er.

Aðalskrivarin í heimsheilsustovninum, Margaret Chan, fór í gjár klokkan 11 á fund við ráðgevar og serfrøðingar. Útbreiðslan av virusinum í Victoria í Avstraliu var orsøkin til kreppufundin. Fimm fólk eru innløgd á intensivu deild í Avstralia, og yvir 1000 tilburðir av sjúkuni eru staðfestir í landinum.

fyrradagin tosaði leiðslan í heimsheilsustovninum við myndugleikarnar í teimum ringast raktu londunum, til tess at fáa staðfest upplýsingar um talið av smittaðum, boðar bretska kringvarpið BBC frá.

Stovnurin hevur higartil skrásett 27.737 tilburðir av H1N1-smittu í 74 londum. Av teimum smittaðu eru 141 deyð.